# Atgongumerkjasølan til ASFALT er byrjað

**Ætlar tú tær á stóra tónleikatiltakið í Tórsgøtu 2. og 3. juni, har fleiri enn 60 føroyskir tónleika- bólkar og einstaklingar koma at taka lut, er tíðin komin at keypa tær atgongumerki.**

Atgongumerkir til ASFALT eru at fáa á Kunningarstovuni í Tórshavn, í handlinum hjá Kall í SMS og á www.kontoin.fo.

### 3 ymisk atgongumerki

Tað er trý ymisk atgongumerki til ASFALT

ASFALT DELUXE: 425 kr Galdandi fyri báðar dagarnar og gevur atgongd til útipallin og teir 5 innipallarnar.

Asfalt DeLuxe er ikki galdandi fyri barnatiltakið.

ASFALT LIGHT: 275 kr Galdandi fyri báðar dagarnar og gevur bert atgongd til útipallin.

Asfalt Light er ikki galdandi fyri barnatiltakið.

ASFALT JUNIOR: 100 kr Gevur bert atgongd til stóra barnatiltakið, sum verður leygardagin 3. juni kl. 10-13.

Børn undir 13 ár hava ókeypis atgongd til barnatiltakið í fylgi við vaksnum.

### 6 pallar við fjølbroyttum føroyskum tónleiki

Tónleikurin, sum fer at runga á ASFALT verður sera fjølbroyttur. Møguleiki verður at hoyra pop, punk, gospel, heavy, blues, rock, jazz, kórsang, fólkatónleik, horntónleik, klassiskan tónleika osfr.

Tað verða 6 ymiskir pallar á asfalt. 5 innipallar og 1 stórur útipallur.

Innipallarnar verða á hesum støðum:

Tjóðpallurin
Posthúskjallarin
Margarinfabrikkin
Miðlahúsið
Hotel Tórshavn

Útipallurin verður á parkeringsplássinum við Hotel Tórshavn.

Skráin á ASFALT verður skipað soleiðis, at framførslur verða á øllum 5 innipallinum samstundis. Tey sum keypa sær ASFALT DELUXE fyri 425 kr, hava atgongd til allar hesar 5 pallar, umframt at tey hava atgond til stóra útipallin. Meðan framførslur eru á innipallinum, hvílur útipallurin.

Á stóra útipallinum fara nøkur av høvuðsnøvninum s.s. Lena, Høgni Lisberg, Annika Hoydal, 200 o.o at framføra. Tey sum keypa sær ASFALT LIGHT fyri 275 kr, hava bert atgongd til útipallin. Meðan framførslur eru á útipallinum, hvíla allir 5 innipallarnar.

Leygardagin 3. juni kl. 10-13 verður eitt serstakt barnatiltak í Tórsgøtu, har gøtan verður á tremur við tónleiki, sangi, gykli og øðrum spennandi undirhaldi til børn og glaðar barnasálir.

Børn undir 13 ár hava ókeypis atgongd til barnatiltakið, tey skulu tó verða í fylgi við einum vaksnum. Tað er neyðugt at tann vaksni keypir sær eitt ASFALT JUNIOR fyri 100 kr.

### Nógv spennandi nøvn á ASFALT

Longu nú eru nógv spennandi nøvn almannakunngjørd og komandi vikurnar fara enn fleiri nøvn at verða almannakunngjørd. Til ber at lesa um tónleikatiltakið, bólkarnar o.a. sum hendir í samband við tiltakið www.asfalt.fo

Millum bólkarnar sum koma at taka lut á ASFALT eru:

200
Deja Vu
Kári Sverrisson
Popkorn
Skunk
The Story Ends
All That Rain
Høgni Lisberg
Lena
Pætur við Keldu
Stanley Samuelsen
Holgar og Villmenn
Annika Hoydal
Isadora & The Rebels
Makrel
Safir
Stórbandittarnir
Búi Dam
Tórshavnar Kamarkór
Marius
Side Effect
Tarira

# Føroyskur páskatónleikur í Keypmannahavn, Havn og Nólsoy

**Konsertskráin hjá Mpiri í vár hevur páskini sum tema. Skráin er samansett av páskatónleiki úr ymsum londum og tíðarskeiðum. Ein partur av tónleikinum er føroyskur: gamlir páskasálmar í nýggjari útseting og eisini heilt nýskrivaður tónleikur**



*Mpiri hevur sum endamál at syngja nýggjan føroyskan tónleik. Myndin er tikin í Húsavík*

TÓNLEIKUR
*Tíðindaskriv*

Mpiri er ein føroyskur vokalbólkur í Keypmannahavn við 13 ungum sangarum. Sum heild fevna konsertirnar breitt, heilt frá gregorianskum sangi til nýggjan kórtónleik. Á skránni eru verk eftir millum onnur: Francis Poulenc, Kára Bæk, Per Nørgård, Urmas Sisask og Arvo Pärt.

29/03: Kl. 20:00 – Konsert í Samuelskirkjuni, Thorsgade 65, Keypmannahavn.

05/04: Kl. 20:00 – Koncert í Simeonskirkjuni, Sjællandsgade 12B, Keypmannahavn.

08/04: Kl. 15:00 - Konsert í Vesturkirkjuni, Tórshavn

09/04: Kl. 16:00 - Konsert í Nólsoyar Kirkju

Í sambandi við Føroyaferðina fer Mpiri at upptaka 3 verk hjá Kára Bæk til nýggja fløgu við føroyskum kórtónleiki. Hesi verk verða eisini at hoyra á konsertunum.

### Bakgrund

Mpiri varð stovnað fyri 8 árum síðani og bleiv fram til 2002 stjórnað av Sunleivi Rasmussen. Núverandi kórleiðarin eitur Gorm Larsen. Hann er útbúgvin kór- og orkesturleiðari frá Kongaliga Danska Musikkonservatoriinum og hevur eisini lært á Royal College of Music í London og lisið Tónleikavísund á Universitetinum í Århus. Mpiri hevur verið á fleiri konsertferðum millum annað til Føroya, Íslands, Týsklands, Finnlands og Svøríkis.

Bólkurin hevur sum endamál at syngja nýggjan føroyskan tónleik og hevur í fleiri umførum bílagt nýggj verk frá føroyskum tónaskøldum. Frumframførslur eru tí javnan á skránni á konsertunum hjá Mpiri. Serliga verk eftir unga tónaskaldinum Tróndi Bogasyni, ið eisini syngur tenor í vokalbólkinum. Hes-

## Konsert við Barnakórið Glyvra kirkju

KONSERT

Fríggjakvøldið 7. apríl kl. 19.30 verður konsert í Glyvra kirkju við barnakórinum.

Á skránni eru sálmar, sangir og negro spirituals.

Sungið verður bæði uttan fylgispæl og saman við klaver-, orgul- og cellofylgispæli. Barnakórið, ið telur uml. 30 børn úr 1. – 6. flokki, hevur ígjøgnum veturin vant eina ferð um vikuna í kirkjuni.

Eftir konsertina verður ein drekkamuður at fáa.

# Summar Festivalurin læt Virkishúsinum ljóðføri

**Á móttøku í nýggja Virkishúsið í Klaksvík lat Summar Festivalurin,Virkis húsinum stórfingna gávu, ið kann fáa alstóran týdning fyri tónlistarligu menningina í Klaksvík**

GÁVAN TIL KLAKSVÍKINA
*Niels Uni Dam*
*nielsuni@sosialurin.fo*

Týskvøldið fekk Virkishúsið stórfingna gávu frá Summar Festivalinum. Húsið hevur ikki havt nakað stórvegis av ljóðførum, men tað er nú broytt, tí Summar Festivalurin læt húsinum bæði trummusett, ljómborð, mikrofonir, gittar, bassgittar og forsterkarar.

Tað er kent frá tónleikafestivalum uttanlands t.d. Roskilde Festivalinum, at ein partur av yvirskotinum fer til vælgerandi endamál. Henda leistin hevur Summar Festivalurin við hesum tikið upp.

– Vit eru sera fegin um hesa stóru gávu, og vit vóna, at tey ungu fara at brúka ljóðføri. Vónandi fer onkur nýggjur tónleikabólkur at spyrjast burturúr, segði Beinta Gregersen, leiðari fyri Virkishúsið, tá ið hon fekk handað gávuna.



*Summarfestivalurin hevur latið Virkishúsinum í Klaksvík ljóðføri til eitt heilt orkestur*

Steintór Rasmussen handaði vegna Summar Festivalin gávuna, og hann segði seg fegnast um, at Klaksvík hevði fingið eitt nýtt ungdómshús. Hann vónaði eisini, at ljóðførini fóru at verða brúkt, og at nakað gott fór at koma burturúr.

Steintór umboðar eitt ættarlið, tá Klaksvík gekk undir heitinum tónleikahøvuðsstaður Føroya, men seinnu árini hava Havnin og Eysturoyggin yvirhála Klaksvíkina, tá tað snýr seg um nýggjar og spennandi bólkar. Steintór og hinir handan Summar Festivalin kunnu við hesum, vera við til at venda hesi gongd.

Tey ungu í Klaksvík hava veruliga tikið nýggja Virkishúsið til sín. Húsið hevur havt opið í eina tíð, og ymisk tiltøk hava eisini verið á skránni.

Tey ungu sluppu beinanvegin at royna ljóðførini, og tey tóktust verða fegin um gávuna.